

# Hetland stevnir fram móti framtíðar grønum búskapi

Hetta skal lata seg gera við m.a. stórum vindmylnulundum eins og elriknari olju- og gassframleiðslu við føroyska markið. Ein av oddamonnunum aftanfyri umfevnandi ORION verkætlanina í Hetlandi, Gunther Newcombe, fer at hava almenna framløgu á Atlantic Fair messuni í Klaksvík í mai.

MYND: WWW.HERALDSCOTLAND.COM

JAN MÜLLER

Føroyingar nýtast ikki at leita langt burtur í onnur lond fyri at fáa íblástur, vitan og royndir til at fara undir menning av varandi orku eins og av kolvetnisverkætlanum. Tað kunnu vit nevniliga fáa frá okkara næsta granna, Hetlandi, har tey eru við at seta út í kortið sera spennandi og avbjóðandi verkætlanir á nærum øllum orkuøkinum, nakað, sum vit í Føroyum uttan iva kunnu fáa íblástur frá.

Fyri at lata dyrnar upp og fáa innlit í henda skjótt nýggja hetlendska veruleikan, hevur FOÍB, Føroya Orkuídnaðarbólkur, boðið Gunther Newcombe, fyrrverandi stjóra í almennu kolvetnisumsitingini í Bretlandi og í dag ráðgevi fyri varandi orkuverkætlanum í Hetlandi til Føroya. Her fer hann at greiða frá ætlanunum í Hetlandi at fara undir nýggjar verkætlanir á bæði varandi orkuøkinum og eisini innan menning av reinari olju- og gassvirksemi í okkara næsta grannalag. Upprunaliga var ætlanin, at hann skuldi koma til Føroya fyri tveimum árum síðani, men orsakað av korona kemur vitjanin fyrst í lag nú.

Gunther Newcombe kemur til Føroya sum samskipari av ORION verkætlanini, ein sera umfevnandi og spennandi verkætlan, ið er ætlað at broyta Hetland til ein orkumiðdepil í heimsflokki – við at brúka eitt nú land- og havvind eins og sjóvarfals- og bylgjuorku.

ORION stendur fyri "Opportunity for Renewable Integration with Offshore Networks". Undir vitjanini í Føroyum fer Gunther at kunna um ORION verkætlanina, m.a. við eini almennari framløgu á Atlantic Fair messuni, sum verður í Klaksvík í døgunum frá 17. til 19. mai. Hann hugsar eisini at kanna møguleikarnar í Føroyum fyri at menna ein líknandi orkumiðdepil ella partar av honum eins og vita, hvørjir møguleikar eru fyri samarbeiði millum Føroyar og Hetland á orkuøkinum. Hann vil eisini fegin frætta, hvussu føroyingar leggja til rættis orkuframtíðina og hvønn íblástur føroyskar royndir og ætlanir kunnu geva hetlendingum.

Gunther er føddur í Wales men hevur búð í Aberdeen í Skotlandi stóran part av lívi sínum. Kona hansara Michelle er úr Hetlandi og verður við á ferðini.

Ráðgevaraarbeiðið í ORION verkætlanini byrjaði fyrst eftir, at hann hevði arbeitt í oljuvinnuni í eitt langt áramál. Hann arbeiddi hjá oljufelagnum BP í 35 ár í londum sum Indonesia, Venzuela og Azerbaijan men eisini í norðurskotlandi eins og á oljumóttøkustøðini í Sullom Voe í Hetlandi. Øll árini hjá BP arbeiddi hann við nøgvum ymsum uppgávum alt frá leiting til avrigging av oljuútbúnaði, eisini nevnt "decommissioning". Tá hann gavst hjá BP fór hann at arbeiða hjá almenna stovninum OGA, Oil and Gas UK, sum tekur sær av loyvisgevingini til og eftirlit við leiting á bretska landgrunninum. Í hesum arbeiðinum var hann eisini við til at menna samstarv og samskipa føroyska og bretska leitiútbjóðingar í 2019 báðumegin markið. Við hesum varð eisini grundarlag lagt fyri víðari samstarvi millum londini á orkuøkinum.



Gunther Newcombe

Undir komandi vitjanini í Føroyum fer Gunther eisini at hitta Magnus Rasmussen, landsstýrismann í orku- og umhvørvis- og vinnumálum, har hann fegin eisini vil umrøða m.a. komandi leiting og virksemi bæði í føroyskum og bretskum øki.

Eftir fimm ár sum stjóri í OGA fekk Gunther í 2020 handað virðislønina OBE (Order of the British Empire) í sambandi við heiðringina hjá bretsku drotningini á nýggjárinum.

Í eini samrøðu um sítt arbeiði sum ráðgevi at vera við til at menna Hetland til grøna orkuskiftið segði hann m.a., at endamálið við ORION verkætlanini er fullkomiliga at broyta hetlendska búskapin til eitt nú at gerast eitt oyggjaland uttan útlát.

Men við hesum er ikki ætlanin at gevast við olju- og gassídnaðinum, sum hevur havt so stóran týdning fyri Hetland. Tvørturímóti er eitt av endamálunum við verkætlanini at elektrifisera bæði verandi og komandi olju- og gasspallar kring Hetland, eisini teir, sum uttan iva gerast veruleiki tætt við føroyska markið, nevniliga Cambo og Rosebank, komandi árini. Hetta fyri at minka munandi um útlátið. Henda ætlan við at framleiða meira reina og burðardygga orku er eisini ein týðandi partur av tilgongdini hjá ídnaðinum at liva upp til sína ábyrgd at røkka null útláti.

Enn eitt av endamálunum við ORION verkætlanini er at framleiða grønt vetni til útflutnings eins og til heimliga nýtslu í Hetlandi, og sum í longdini kann vera við til at minka um nýtsluna av kolvetni. Alt í alt skal henda stóra verkætlan vera við til at skapa nógv nýggj arbeiðspláss. Tað er m.a. við hesum boðskapum í skjáttuni, at hesin roynd og kendi orkumaðurin úr Wales kemur á vitjan í Føroyum og eitt nú fer at vitja og hava eina framløgu á Atlantic Fair í Klaksvík.
















